Møguleikin at flyta er nógv avmarkaður

Eingin fótbóltsspælari fær loyvi at koma til Føroya eftir 1. august, og nú skulu flytipappírini hjá spælarum, sum ætlast at spæla í Føroyum vera skrivaði, áðrenn FSF góðkennir flytingina

Reglurnar fyri flyting av leikarum millum feløg gerast nú strangari, soleiðis at leikari ikki kann flyta eftir 1. august

Tilvildarlig savnsmynd

Kanska vóru tað fjølmiðlarnir, sum vóru stóru tapararnir, tá spurningurin um útlendskar spælarar og útisetar í føroyskum fótbólti leygardagin varð viðgjørdur á aðalfundinum hjá FSF.

Í Danmark hava teir orðatakið um, at tá okkurt óvæntað kemur á borðið, so hevur onkur togað eina kanin fram í ljósið. Nakað soleiðis hevur tað kenst, tá útlendingar og serliga føroyskir spælarar, ið hava roynt seg uttanlands, eru komnir heim til síðstu umførini í landskappingini.

Satt at siga plagar tað at vera gott tilfar at tosa og skriva um, at nú skal hesin ella hasin spælarin koma úr útlandinum at hjálpa hesum ella hasum felagnum at vinna FM ella at sleppa undan niðurflyting.

Táttaðu í

Sjónarmiðið um at uppskotið um broytingar fór at hava við sær, at landsliðsspælararnir, ið spæla fótbólt í Íslandi, ikki fara at hava møguleika fyri at halda dystarvenjingina í føroyskum kappingini eftir at íslendska kappingin er liðug, varð nevnt, men tað var breið semja á aðalfundinum um, at tað var neyðugt at tátta í.

Nú er galdandi, at tað er ikki loyvt áhugaleikara og avtaluleikara at flyta frá felagi og til annað felag eftir 28. juli í kappingarárinum.

Nú er eisini galdandi, at útlendskur spælari kann bert fáa loyvisbrævi til at spæla í 1. 2. 3. og 4. deild á mannafólkasíðuni og í 1. deild hjá kvinnum fyri kappingarárið, um umsókn um hetta verður latin kappingarnevndini í seinasta lagið 28. juli í kappingarárinum. Við umsóknini skal fyriliggja skrivlig váttan frá útlendska leikaranum og felagnum, hann spælir við, um ætlaðu flytingina.

Føroyingur, sum hevur havt ella hevur bústað í útlondum, kann fáa loyvisbrøv til at spæla í Føroyum, tá hann er leysgivin sambært ásetingunum. Føroyskur avtaluleikari uttanlands kann bert fáa loyvisbræv at spæla í Føroyum, um umsókn um hetta verður latin kappingarnevndini í seinasta lagið 28. juli í kappingarárinum. Við umsóknini skal fylgja skrivlig váttan um ætlaðu flytingina frá avtaluleikaranum og felagnum, sum hann er avtalubundin við.

Fleiri av fundarluttakarunum vildu vita, hvat liggur í dagfestingini 28. juli. Formaðurin í kappingarnevndini, Dánjal Andreasen, svaraði, at seinnu árini hava freistirnar verið tambaðar. Onkur feløg hava undan 1. mai, sum hevur verið síðsta freist, tá tað hevur snúð seg um útlendingar, sent nøvnini á einari rúgvu av útlendingum inn.

Ætlanin er at fyribyrgja hesum, og vindur í táttaðu orðingini er, at nú skal tað ikki bera til at flyta millum feløgini og at fáa føroyskar og útlendskar spælarar at styrkja um liðini, eftir at summarstaðgurin hevur verið. Um ivaspurningar stinga seg upp, so eigur og skal kappingarnevndin nýta sínar heimildir, undirstrikaði Dánjal Andreasen.

JH

Máltindurin
1. deild kvinnur

Ioana Rápa	VÍF	146	(44)
Regina Rádó	VB	121	(33)
Lotte Sørensen	Kyndil	114	(47)
Vesna Tomajek	Stjørnan	103	(46)
Sunrid Gleðisheygg	Tjaldur	82	(21)
Jacklin Durhuus	VÍF	81	(5)
Inga F. Danberg	Neistin	78	(21)
Simona Hansen	Stjørnan	72	(8)
Arnleyð Krosslá	VB	68	0
Andrijana Milodanovic	Stjørnan	67	(2)
Gurið Mortensen	VB	67	(3)
Katrin á Neystabø	Neistin	63	(20)
Annika Ljósstein	Stjørnan	61	(15)
Ann Hansen	Kyndil	60	(10)
Ileana Manolescu	Neistin	56	(13)

Eingin tykist at kunna steðga málslúkinum úr Vestmanna. Ioana Rápa

1. deild menn

Heini Joensen	Neistin	146	(32)
Sámal Joensen	VÍF	145	(29)
John Petersen	StÍF	133	(39)
Áki Olsen	Neistin	127	(18)
Artur Johansen	StÍF	123	(24)
Petur Martin Johansen	KÍF	102	(36)
Jakob Jónsson	Kyndil	99	(7)
Bjarni Wardum	Kyndil	97	(24)
Sverri Justinussen	Tjaldur	96	(17)
Ingi Olsen	VÍF	92	(6)
Halgir D. Olesen	H71	84	(7)
Suni F. Johannesen	Tjaldur	80	(20)
Vagnur Johannesen	KÍF	79	0
Petur Martin Poulsen	KÍF	78	(6)
Jákup Dam	KÍF	71	(5)

Støðan 1. deild kvinnur

	dystir	v	-	j	-	t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1 Stjørnan	5	5	-	0	-	0	433	336	97	19
2 Kyndil	5	3	-	0	-	2	362	316	46	13
3 VÍF	5	3	-	0	-	2	380	339	41	13
4 Neistin	5	3	-	0	-	2	320	321	-1	11
5 VB	5	1	-	0	-	4	375	392	-17	6
6 Tjaldur	5	0	-	0	-	5	268	434	-166	0

Stíf hevur tikið liðið úr kappingini

Støðan 1. deild menn

	dystir	v	-	j	-	t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1 Neistin	6	6	-	0	-	0	529	450	79	21
2 VÍF	6	4	-	0	-	2	519	416	103	19
3 StÍF	6	4	-	0	-	2	521	451	70	19
4 Kyndil	6	4	-	0	-	2	508	441	67	15
5 KÍF	7	3	-	0	-	4	432	539	-107	7
6 H71	6	1	-	0	-	5	428	508	-80	4
7 Tjaldur	7	0	-	0	-	7	459	591	-132	3

Bardagin hjá Jeanne d'Arc í filminum er politiskur, og spurnartekin verður eisini sett við, hvussu rætt kríggj er

Jeanne d'Arc

Eitt heldur seinkað ummæli av filminum

Meinhard Jensen

Jeanne d'Arc er um eina nítjan ára gamla gentu, sum gerst herførari hjá fraklendingum og vinnur fleiri sigrar. Katolikkarnir fordømdu hana í 1431, men gjørdu hana til halgimenni í 1929.

Luc Besson hevur gjørt filmin, sum á enskum eitur *The Messenger: The Story of Joan of Arc*. Hann er pakkaður við kendum andlitum, skemti, spenningi og góðum effektum. Hann er bæði søguligur filmur og krígsfilmur, og nógvir teknikkir frá actionfilmum eru eisini nýttir. Og so er nógv skemt við, og tað riggar sum oftast væl. Vektin í filminum, haldi eg, er, at alt hetta eru karmar um eina góða søgu, sum hevur pláss fyri andaligari, politiskari og heimspekiligari rannsakan.

Søgan

Í stuttum er søgugongdin tann, at vit síggja Jeanne d'Arc sum smágentu, har hon hevur andaligar sjónir, og vit síggja onglendingar oyðileggja bygd hennara og drepa millum annað systir hennara. Hon er inniliga søkjandi andaliga og fer til skriftarmál hvønn dag. Einaferð síggja vit hana súmbolskt sameinast við Kristus, tá hon brýtur inn í eina kirkju og drekkur av kalikinum. Vínið rennur sum blóð eftir andliti hennara, og hetta talar bæði um Jesu blóð og blóðið, sum seinni flýtur í filminum.

Og so fara vit fram í tíðina. Jeanne (spæld av Milla Jovovich, eisini kend frá *Fifth Element*) skal hitta ein sokallaðan *Dauphin*, sum kann gerast kongur í Fraklandi. Hon er jú ung, men vísir til myndugleika frá Gudi, tá hon krevur at sleppa at tala við hendan *Dauphin* og siga honum, at tey skulu herja á býin Orleans, og at hann síðani skal krýnast. Hesin (spældur av John Malkovich) og mamma hansara (spæld av Faye Dunaway) síggja sær vegin fram til valdið og lata Jeanne hjálpa sær. Hon sleppur at stjórna einum heri ímóti onglendingum, og har byrjar spenningurin og tað nógva action, sum er í filminum. Hetta er Dávid og Goliat umaftur, men søgan er bygd á søguligar hendingar, og tí er hon trúlig.

Men aftaná umleið tveir triðingar broytist alt knappliga. Tá er tað, sum Jeanne d'Arc søguliga er kend fyri, liðugt. Gentan hevur avriað sítt, og heimurin kring hana heldur seg ikki hava brúk fyri henn meir. Her fer filmurin í holt við teir átrúnaðarligu spurningarnar, sum byrja í hesum: var Jeanne d'Arc bert ein úrmælingur, ella var Gud við henni? Sensationelt eru slíkir spurningar kanska uttan áhuga, og tí, siga summi, fer luftin úr ballónini, tá spurningarnir koma, men tað ger hon ikki. Søgan frammanundan skapir grundarlag fyri spurningunum, og teir geva ikki bert filminum dýpd, men eisini persóninum Jeanne d'Arc. Tað er ikki ofta, at filmir megna at siga, hvat fyri hóttan veruligt vónloysi er.

Trúarspurningarnir verða settir fyrst í eini rættarsak, sum líkist nógv søguni um Jesus. Jeanne verður fyrst ákærd av andaligum leiðarum (katolikkakirkjuni) og síðani av verðsligum leiðarum (ensku yvirvøldini). Tað er týðiligt, at filmurin vil hava hyggjaran at síggja Jeanne sum ein parallel til Jesus, tí hon er tann, sum kennir Gud, meðan teir, sum siga seg kenna hann, vilja døma hana. Jeanne verður pínd illa sum fangi, og tað er eitt drúgt skírishóskvøld við stórari sálarkvøl, áðrenn hon verður leidd út til sítt Golgata. Leiklutin sum Judas hevur ein høgra hond hjá kongi, sum óbeinleiðis er krýndur av Jeanne. Men her eru tað ikki tretivu silvurpengar, men heilir posar av gulli, talan er um. Aðrir parallellar eru, at hon verður ílatin vanæriliga og svikin av øllum sínum.

Har er eisini ein triði ákæri, sum Dustin Hoffmann spælir. Hann er í svørtum klæðum, og andlitið er goymt í eini stórari svartari hettu. Hann er ein gátukendur persónur, tí hyggjarin veit ikki, hvør hann er. Stundum ljóðar hann sum røddin úr neðra, stundum sum Gud. Kanska hann er, sum onkur sigur, hennara religiøsa samvitska. Hann kann eisini síggjast sum stórinkvisitorurin. Tað vil siga, tann hægsti í katólsku inkvisitiónini, altso yvirkanningardómarin ella tann ultimativi spyrjarin. Í øllum førum er hann ein dularfullur skapningur, tí hann fær umskapt seg og er ósjónligur fyri øllum uttan Jeanne.

Sjálvur helt eg, at hann minti onkursvegna um Stórinkvisitorin í *Karamasovbrøðnunum* hjá Dostojevski. Hvussu er og ikki, hann er tann, sum rakar best við sínum spurningum. Kanska eisini tí at hann traðkar til, tá hinir hava niðurbrotið hana sinnisliga. Besta svarið er helst, at Dustin Hoffman-persónurin er allar røddirnar. Bæði tær sum ivast og tær sum trúgva. Hann er menniskjuni, hon sjálv, Gud og Satan, alt í einum.

Summi halda kanska, at tað er ein veikleiki, at vit ikki kunnu siga fyri vist, hvør hesin maðurin í svørtum er, men fyri meg var tað intenst, tí tað ger, at vit vita ikki, um Jeanne er keypt ella seld, um hon fer at halda fast við trúnna ella avnokta. Tann, sum kanska sjálvur avnoktar, noyðist helst hesa løtuna at halda fast við trúnna, tí filmurin annars hevur lýst Jeanne d'Arc sympatiskt.

Onnur ummæli

Fyri at fáa at vita, hvat onnur halda um filmin, fór eg til útróðrar á alnótini og fann nøkur ummæli. Ein skrivar í *Philadelphia Daily News*: "Dustin Hoffman er onki at reypa av í seinasta triðingi av filminum, tá Besson sleppur luftini úr dynamiska spenninginum, sum hann annars hevði fingið upp at standa."

Hatta er altso kritikkur av tí, sum eg annars helt rigga væl, tí spenningurin fer nemliga ikki úr filminum her, men bara úr actionscenunum. Nú er tað dialogurin, sum ger spenningin. Hetta er annars ein dygd, sum hevur eyðkent fleiri filmir í hálvfemsunum.

Hesin sigur eisini: "Filmurin fer mitt í øllum yvir til at vera kaldur og klaustrofobiskur og at illtonkja hetjuna fyri at hava virkað við eini blanding av hugmóð, fáfongd og religiøsum sannføringum." At tónin broytist í filminum, er satt, men tað er ikki filmurin, sum illtonkir. Hann hevur víst okkum sjónirnar og sigrarnar, og nú letur hann spurningarnar sleppa at tala. Tað skal góð list tora.

Ein frá *Seattle Post-Intelligencer* skrivar: "Hvat í allari víðu verð ger Dustin Hoffman í tí sjálvrannsakandi avgerðarløtuni _ Er hann persónsgeringin av røddunum, sum Jeanne hoyrir, ella er hann Gud ella hvat?" Hesin hevur fatur á rætta endanum, men sær ikki styrkina í tí. Mítt boð er, at tað ikki longur er loyvt at gera list, sum krevur ein aktivan hyggjara. Logikkurin hjá hesum ummælaranum er: hetta er ikki nóg greitt til mín at fata, og tí er tað vánaligt. Tað ber ikki til at liva í ævir av andaligum poppkorni. (Tað er gleðiligt, at summir filmir eru væl gjørdir upp á allar mátar og samstundis lýsa menniskjað ikki bara sum sansaligt, nyttumoralskt og politiskt, men eisini andaligt í kristnari merking.

Bardagin hjá Jeanne d'Arc í filminum er politiskur, og spurnartekin verður eisini sett við, hvussu rætt kríggj er. Einaferð kemur Jesus sjálvur (ella er tað Hann) og spyr, "Hvat er tað, tú gert við meg?" og síðani rennur blóð úr pannu Hansara. Kanska verður hansara blóð eisini úthelt, tá vit berjast.

Men kríggið er eisini myndarligt (allegoriskt), eins og í bókini *Hin heilagi bardagin* hjá John Bunyan. Her er ein býur, sum er hertikin av fíggindanum, men skal vinnast aftur. Soleiðis er sálin ein býur, sum skal vinnast, og vit vilja helst hava tann rætta kongin innan fyri múrarnar. Býurin kann eisini vera mynd av Jeanne d'Arc, og í seinasta enda stendur bardagin um sál hennara.

Tað er eisini gott og uppbyggiligt fyri hyggjaran at síggja tænastulyndið hjá Jeanne d'Arc: hon stríðist fyri sakina, tí hon er send. Hon er tænari og vil ikki vinna hvørki heiður ella vald.

Ein góð mynd er, tá hon er vakin, meðan allur herur hennara, fleiri túsund mans, liggur og svevur. Teir eru í herklæðunum og eru vápnaðir, men hava mist vónina um at sigra og eru sovnaðir. Hon gongur millum teir og biður teir vakna, tí nú skulu teir berjast. Soleiðis hava summi vakt einsamøll millum túsundir av sovandi.

Onnur viðurskifti, sum passa til dagin í dag, eru spælið millum veruliga trúgv og alment løntu andaligu leiðararnar, sambandið millum kirkju og ríki, millum Frakland og Ongland (filmurin lýsir fyri tað mesta tað franska, men talan er ensk), millum kærleika til sannleika á aðrari síðuni og kærleika til vald, pengar og tað góða lívið á hinari síðuni. (Og nú til eina grenjuta viðmerking): Nú, beint áðrenn gullkálvadansurin fer at byrja aftur, og vit kanska fáa fleiri valdspostar heima í Føroyum, eru fleiri, sum fara at kenna freistingina. Kanska skuldu tey farið í biografin og spurt seg sjálvan: vil eg vera sum Jeanne d'Arc, ein persónur við veruligari sál, ella vil eg vera sum kongurin og hansara fólk og prestarnir, sum elska búk sín fram um alt, men ikki hava anda (fyrr kappaðust vit um at siga, "eg eri John Wayne," ella, "eg eri Chaplin").

Endi

So mikið um tað. Filmurin er væl spældur, myndirnar eru flottar, og søgan er góð. Viðhvørt er tað ógvusligt, viðhvørt pent. Skemtið er actionskemt, og tað er ikki serliga realistiskt. Men stuttligt. Kanska ov franskt fyri summi. Og, ja, tað tykist eitt sindur fjákut, at Milla Jovovich skal hava sovorðið hár, um hon hevur. Tað er rættuliga passandi og miðaldarligt í fyrstani, men fímóti endanum er tað so modernað, at tað er næstan stuttligt. Ikki veit eg.